# Avloysari til kantinu

**Søkt verður eftir summaravloysara til kantinuna á P/F Postverk Føroya, Óðinshædd 2. Talan er um eitt avloysarastarv í tíðarskeiðnum frá 31. juli til 25. august 2006.**

**Starvið**
Starvið umfatar alt vanligt kantinuarbeiði so sum at fyrireika lættar máltíðir, vaska upp v.m.

**Førleikakrøv**
Umsøkjarin skal hava góð samstarvsevni, kunna arbeiða sjálvstøðugt og hava royndir sum køkshjálp ella líknandi.

**Løn og setanartreytir**
Løn sambært sáttmála millum Føroya Postfelag og Fíggjarmálaráðið.

**Umsókn**
Send umsókn tína til P/F Postverk Føroya, Óðinshædd 2, FO-100 Tórshavn, att: Heri Kjærbo ella á teldupost heri.kjarbo@postur.fo áðrenn týsdagin 18. juli 2006

Nærri fæst at vita um starvið hjá Hera Kjærbo, starvsfólkaleiðara, á telefon 346095 ella á heri.kjarbo@postur.fo.

Pf. Postverk Føroya



Postverk Føroya

P/F Postverk Føroya · Óðinshædd 2 · 100 Tórshavn · Tlf. 346000



## AVGREIÐSLUFÓLK TIL FØROYA BANKA

**Vit leita eftir jaligum og fyrikomandi starvsfólki, til avgreiðsluøkið í Tórshavn. Tú brennir fyri at geva kundum okkara eina góða tænastu og uppliving, sum fær tey at kenna seg vælkomin.**

### Arbeiðsøkið
Sum avgreiðslufólk í einum dynamiskum umhvørvi, kemur tú at arbeiða við:

- Kassaavgreiðslu
- Peningaflytingum
- Uppteljing og eftirliti við náttarboksum
- Øðrum fyrifallandi arbeiði

### Førleikakrøv
Vit vænta at tú:

- Hevur peningastovns- ella skrivstovuútbúgving, hetta er tó ongin treyt
- Setur kundan í miðdepilin og er tænastusinnað/ur
- Arbeiðir effektivt og smidliga
- Hevur góðar samstarvseginleikar og dámar at arbeiða bæði sjálvstøðugt og í toymum
- Ert lagalig/ur og opin fyri nýggjum avbjóðingum
- Ert hjálpsom/samur og dugir at skapa álit
- Ert í góðum lag - eisini tá nógv er at gera

Vit leggja stóran dent á at reka álítandi peningastovnsvirksemi, at starvsfólk eru í góðum lag og vænta, at tú gevur títt ískoyti til eitt gott arbeiðsumhvørvi.

### Løn og setanarviðurskifti
Verða avtalað nærri sambært tíni útbúgving og royndum.

### Meira kunning
Meira fæst at vita um starvið við at seta teg í samband við leiðaran fyri Deild Tórshavn, Niels A. Joensen á tlf. 31 13 50, teldupostur niels.joensen@foroyabanki.fo.

### Umsókn
Send tína umsókn við CV til Føroya Banka, Húsagøta 3, FO-100 Tórshavn, att: Bjarki Mohr, ella á teldupost starvsfolk@foroyabanki.fo áðrenn 21. juli 2006.

REPROZ

FØROYA BANKI
100 ár – yngri enn nakrantíð



# Skrivstovulærlingur

*Vit hava eitt lærupláss leyst at søkja.*

Vit kunnu bjóða eitt lærupláss, har tú lærir allar uppgávur í eini fyrisiting. Tín læra kemur millum annað at umfata: Debitorbókhald, kreditorbókhald, tolling, postavgreiðsla og allar tær uppgávur, sum annars eru á eini vanligari skrivstovu.

Umsøkjarar skulu hava staðið FHS-prógv, HH ella líknandi miðnámsútbúgving.

Spurningar um starvið, kunnu setast Dan Olsen, fíggjarstjóra, á telefonnummar 313041 ella á teldupostí dan@sms.fo

Skrivlig umsókn, saman við viðkomandi skjølum, skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 24. juli 2006. Send umsóknina til: SMS, att. Dan Olsen, Postboks 1059, 110 Tórshavn, ella sum teldupost til dan@sms.fo.

SMS
ein býlingur í Havn

SUNSET Boulevard

# Starvsfólk

## TIL SUNSET BOULEVARD Í SMS

### Fullatíð
Søkt verður eftir fólki M/K í aldrinum 17 ár og eldri til at arbeiða fullatíð – at byrja skjótast tilber. Ert tú opin, virkin, røkin og dámar tær væl at arbeiða, har tað veruliga hendir nakað, so er hetta tað. Arbeiðstíðirnar eru skiftandi og liggja millum kl. 08.00 og 21.00. Tað ger onki, um tú hevur hóskandi royndir. Vit seta teg inn í okkara arbeiðsmannagongdir, og eftir hetta kanst tú gerast eitt av álitisstarvsfólkum okkara.
Vit gleða okkum til at hoyra frá tær...

**Send umsóknina til:**
Sunset Boulevard, SMS, Postboks 1059, 110 Tórshavn,
ella far inn á www.sms.fo og útfyll eitt umsóknarskjal.